# TILTØK

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evnið: Jesus letur lív sítt fyri vinirnar. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini møti, har Bárður Ljósheim talar. www.hebron.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ John Petersen, evnið: Langmóð, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 Bønarmøti.

**Ebenezer**
Fríggjadagin kl. 21 Ungdómssamfelagsmøti.
Leygardagin kl. 16 Bíbliuseminar, kl. 21 Ungdómssamfelagsmøti.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 17 Ungdómssamfelagsmøti. Øll eru vælkomin. www.ebenezer.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Orðsins tænasta við kommunión í Mariukirkjuni, kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Fríggjakvøldi kl. 19.30-21 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Gunnar Reynslág.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Sunnudagin kl. 11 Møti. Eingin sunnudagsskúli, men kl. 17 Familjumøti. Drekkamunnur aftaná.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøtir.

**Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 er evnið: »Náði Guds í lívi Mósesar« og tilbiðjanarmøti er kl. 12, á báðum møtunum talar Øssur Andreassen. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum, kl. 12 Sunnudagsskúli.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 (í eini skúlastovu) Bøn og bíliutími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina kap. 19. www.livdin.fo

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 20 Møti v/ Hildu og Erik Bedesvaag.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Hildu og Erik Bedesvaag, einki ABC vegna vitjan, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti v/ Rúna Rasmussen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin. www.filadelfia.fo

**Samkoman Rhema**
Fríggjakvøldið kl. 20-22 JC Teens.
Sunnumorgun kl. 11 Møti og Sunnudagsskúli. Biðið verður fyri sjúkum.
www.rhema.fo

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Eingi møti verða sunnudagin vegna møti í Betania í Skopun.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við breyðbróting v/ Jóhan Hendrik Hansen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Møtini við Erik og Hildu Bedsvaag byrja hóskvøldið kl. 20, halda fram leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 17, Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Gøta**
Vegna felagsungdómsmøti í Missiónshúsinum á Toftum verður einki ungdómsmøti í kirkjukjallaranum leygarkvøldið. Bussur koyrir frá kirkjuni í annaðkvøld uml. kl. 19.30 út á Toftir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl. 10.30 Møti við Símun Jaocbsen.
Mánadagin kl. 17.30 TIM5 og kl. 20 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Árna Jacobsen, kl. 21 Ungdómsmøti v/ Pól Johannesen, Hvannasund.

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Hugnakvøld fyri ung.
Sunnudagin kl. 18 Møti við Sannu Hammer.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 14 Undirvísing í lovsangi, kl. 21 Opið hús. Team úr Kolding luttekur til øll tiltøkini.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Vágum.

**KFUM og K, Klaksvík**
Fríggjadagin kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Finn Johannesen, kl. 21 Ungdómsmøti.

**Saron, Viðareiði**
Sunnukvøldið kl. 18 Evangel. fundur har Levi Joensen og aðrir tala, sangkreftir úr Betesda luttaka, øll eru vælkomin.

**Betania, Skopun**
Leygardagin kl. 11 Smáir einglar møtia, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, luttøka úr Skansastovu, kl. 18 Evangel. møti, luttøka úr Skansastovu.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti, ungdómur úr Hoyvík luttekur v/ sangi og drama. Drekka verður aftaná.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti v/ Johan Petur Johannesen.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsongsløta, kl. 18 Møti v/ Johan Petur Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sands missiónshús**
Sunnudagsskúli kl. 14.30.
Kl. 18 Møti, sangur, Terji, Egin, Sølvi o.a. Tú ert vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Einki møti verður sunnukvøldið vegna missiónsviku í Vági.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Vági**
Missiónsvikan heldur fram í kvøld kl. 20 við Regin Høgnesen, Jónhilda og Gulak syngja.
Leygarkvøldið kl. 20 við somu, barnakór úr Sumba luttekur.
Sunnukvøldið kl. 18 við somu, Ebba og Nimrod luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, Eyðun Christiansen talar. Hetta er síðsta møti í gamla húsinum.

**»Eitt umbroytt lív«**
møtir verða í samkomuni í Sion í Vági frá hósdegnum 18. til mánadagin 22. mars. Møtini byrja kl. 19.30 hvørt kvøld, tó sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
***Mánadagur 15. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Myndaveving á loftinum
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
***Týsdagur 16. mars***
kl. 10-11.30 Felagssangur við skúlabørnini »á loftinum«
kl. 14.30 Málprát. Jóhan H. W. Poulsen
***Mikudagur 17. mars***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 15 Vitja framsýningina í Smiðjuni í Lítluvík
**kl. 17-21 Opið hús**
***Hósdagur 18. mars***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Boccia í kjallaranum
***Fríggjadagur 19. mars***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoynni**
Tilhaldið í Sandoynni er opið mánadag og mikudag frá kl. 14-17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Fløvi – dagtilhaldið fyri pensiónistar**
*í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum – allir pensionistar hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag-fríggjadag kl. 15-18.*
***Mánadagin 15. mars***
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
***Týsdagin 16. mars***
Ítriv fyri áhugað
***Mikudagin 17. mars***
Prát og sangur
***Hósdagin 18. mars***
Opið hús
***Fríggjadagin 19. mars***
Stongt.

*Tú fært altíð ein góðan drekkamunn, somuleiðis eitt gott Guðs orð. Bløðini eru altíð til taks. Ver hjartaliga vælkomin í Fløvan.*

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 á Tinghúsvegi 37, Tórshavn. www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 9.00-10.00 opin fundur. Kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Allir fundir eru roykfríir.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.
Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla lærarаíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.:
fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið**
*felagið fyri apopleksi- og afasirakt*
Íslandsvegur 10
tlf. 321520
T-post: heila@post.olivant.fo

**Javni**
*Hoydalsvegur 40 · 3 hædd*
Skrivstovan hjá Javna er opin týsdag til fríggjadag frá kl. 10-14.
Tlf. nr. 314827 · faks 310557.
Vit hava eisini eina heimasíðu: www.javni.fo og t-post adressu: javni@post.olivant.fo har tit altíð eru vælkomin at senda spurningar ella viðmerkingar.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Kvinnuhúsið**
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200. Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
Opið er týs- og hósdag frá kl. 13.00-16.00.
Tlf. 310237.
www.gikt.fo
T-postur: gikt@gikt.fo

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 · fax 313609 og teldupostadr.: deaf_deaf.fo heimasíðan: www.deaf.fo

**Føroya Astma/Allergifelag**
MBF-húsið, Íslandsvegur 10c, Tlf./fax 311419.
Upplatingartíðirnar eru: hvønn hósdag kl. 16.30-18.



# FILMSTEIGURIN

## Welcome to the Jungle

Heimsmeistarin í wrestling, The Rock, hevur leiklutin sum Beck. Og Beck loysir sínar uppgávur, soleiðis sum hann heldur, at tær skulu loysast. Aloftast við eitt sindur av vøddaspæli uppi í leikinum.

Fyri at fáa møguleikan at byrja eitt nýtt og friðarligari lív, skal Beck bara avgreiða eina ferð til Brasilia, har hann í frumskóginum skal finna ein ungan mann, Travis, og fáa hann heim til USA.

Als ikki truplasta uppgávan, sum hann hevur havt, men í frumskógini hevur ein ránsmaður, Hatcher, uppbygt sítt egna kongaríki, har hann er einaræðisharri yvir lítla býnum og gullnáminum, sum er har á leiðini.

Hatcher dámar ikki Beck og so als ikki ætlanir hansara um at flyta Travis til USA. Serliga ikki, nú hann er kunnaður um, at Travis er á slóðini eftir einum stórum dýrgripi. Og so sigur tað seg sjálvt, at ætlanirnar hjá Beck um eina seinastu lætta uppgáva als ikki halda…

Í høvuðsleiklutunum í hesum ferðmikla filminum síggja vit millum onnur The Rock, Seann William Scott, Christopher Walken og Rosaria Dawson. Hendan seinasta nevnda hevur leiklutin sum ein annar dýrgripur í filminum. Nevnliga tann vakra Mariana.





## Tá tú minst væntar tað

Harry Sanborn er ein ríkur 63 ára gamal einsamallur og ríkur maður. Hann er ein sannur playboy, sum ongan tíð hevur eina kvinnu, sum er yvir 30 ár.

Eitt vikuskifti er hann saman við snotiligu Marin, og tá verður hann brádliga tikin á bóli av fráskildu rithøvundamammu hennara, Eriku og systir hennara, Zoe.

Eftir døgurðan ger Harry tað, hann er mentur, fyri at fáa eitt spakuligt hjartaanfall, so hann kann sleppa á sjúkrahúsið. Ungi læknin á staðnum, Dr. Julian Mercer, gerst bergtikin av Ericu, men hon heldur – at byrja við – at hann er ov ungur. Harry verður fyri fyrst »innlagdur« í húsunum hjá Ericu, men sum tíðin gongur, gerast kenslur teirra alsamt sterkari. Men tað er trupult at læra gamlar hundar nýggj kynstur, og Harry hevur so slettis ikki fatað tær broytingar, sum eru um at henda.

Í høvuðsleiklutinum í hesum hugkveikjandi filminum síggja vit millum annað Jack Nicholson, Amanda Peet, Keanu Reeves og Diane Keaton, og tað eru í ølum førum leikarar, sum borga fyri stórari góðsku á hvítu løriftinum.





Frumsýning
Fríggjadagin 19.03. kl. $18^{45}$ Fríggjadagin 19.03. kl. $23^{30}$
Leygardagin 20.03. kl. $18^{45}$ Leygardagin 20.03. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 14.03. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Frumsýning
Fríggjadagin 19.03. kl. $21^{00}$ Leygardagin 20.03. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 14.03. kl. $19^{30}$




Fríggjadagin 19.03. kl. $23^{00}$ Leygardagin 20.03. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 14.03. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 19.03. kl. $20^{30}$ Leygardagin 20.03. kl. $20^{30}$
Sunnudagin 14.03. kl. $20^{30}$




Fríggjadagin 19.03. kl. $18^{15}$ Leygardagin 20.03. kl. $18^{15}$
Sunnudagin 14.03. kl. $18^{15}$

**KOMANDI FILMUR**

Frumsýning
Fríggjadagin 23.04. kl. $18^{00}$
Fríggjadagin 23.04. kl. $20^{45}$
Fríggjadagin 23.04. kl. $23^{30}$
Leygardagin 24.04. kl. $18^{00}$
Leygardagin 24.04. kl. $20^{45}$
Leygardagin 24.04. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 25.03. kl. $17^{00}$
Sunnudagin 25.03. kl. $19^{45}$
Sunnudagin 25.03. kl. $22^{30}$
Mánadagin 26.04. kl. $17^{00}$
Mánadagin 26.04. kl. $19^{45}$
Mánadagin 26.04. kl. $22^{30}$
Týsdagin 27.04. kl. $17^{00}$
Týsdagin 27.04. kl. $19^{45}$
Týsdagin 27.04. kl. $22^{30}$




Mikudagin 28.04. kl. $17^{00}$
Mikudagin 28.04. kl. $19^{45}$
Mikudagin 28.04. kl. $22^{30}$
Hósdagin 29.04. kl. $17^{00}$
Hósdagin 29.04. kl. $19^{45}$
Hósdagin 29.04. kl. $22^{30}$
Forsølan er byrjað